ALMANNAMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF SOCIAL AFFAIRS

Løgtingið
Trivnaðarnevndin

Dagur: 13. desember 2018
Mál: 18/01040-4
Viðgjørt: HP

**Viðv. løgtingsmáli nr. 14/2018 um Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um familjuískoyti**

Vísandi til samskifti millum Trivnaðarnevnd Løgtingsins og Eyðgunn Samuelsen, landsstýriskvinnu, skal hervið verða víst á, at hesar broytingar kunnu gerast í løgtingsmáli nr. 14/2018:

**Til pkt. 2** Í § 2, stk. 2 verður "5.000 kr." broytt til: "6.000 kr."
**Til pkt. 3** Í § 2, stk. 3 verður "280.000 kr." broytt til: "320.000 kr."
**Til pkt. 4** Í § 2, stk. 4 verður "5.000 kr." broytt til: "6.000 kr."
**Til pkt. 6** Í § 3, stk. 2 verður tvær staðni "280.000 kr." broytt til: "320.000 kr."
**Til pkt. 7** § 3, stk. 3 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 3.* Prosentparturin sbrt. stk. 1 og 2 er:
1) 25% fyri 1 ella 2 børn.
2) 30% fyri 3 børn ella fleiri."
**Til pkt. 8** Broyting í løgtingsmáli nr. 14/2018, § 1, pkt. 8 verður tikin burtur.
**Til pkt. 9** Broyting í løgtingsmáli nr. 14/2018, § 1, pkt. 9 verður tikin burtur.

Harumframt ynskir Trivnaðarnevndin at broyta skipanina soleiðis, at útgjøld á 300 kr. ella lægri skulu fella burtur. Hetta kann gerast við at broyta § 6 í lógini um familjuískoyti soleiðis:

Í § 6 verður "100 kr." broytt til: "300 kr."

Við broytingunum omanfyri fer uppskotið at hava við sær, at útreiðslur til tær familjur, sum eru í skipanini í dag, fara at økjast við uml. 2,1 mió. kr. um árið. Harumframt fara nýggjar familjur at fáa rætt til familjuískoyti, men tað er ikki gjørligt at meta um kostnaðin av hesum.

Um broytingarnar omanfyri verða settar í gildi, fer upphæddin, sum familjurnar hava rætt til at hækka. Yvirlit yvir broytingarnar síggjast í talvuni á næstu síðu.

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
(+298) 30 40 00 • (+298) 30 40 45 • amr@amr.fo • www.amr.fo

**Familjuískoyti um mánaðin sambært galdandi lóggávu og sambært broytingum í hesum brævi**

| **Støk** | 1 barn | | 2 børn | | 3 børn | | 4 børn | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Inntøka | Verandi | Nýtt | Verandi | Nýtt | Verandi | Nýtt | Verandi | Nýtt |
| 200.000 | 1.500 | 2.000 | 1.917 | 2.500 | 2.333 | 3.000 | 2.750 | 3.500 |
| 225.000 | 1.083 | 1.896 | 1.396 | 2.396 | 1.708 | 2.875 | 2.125 | 3.375 |
| 250.000 | 667 | 1.375 | 875 | 1.875 | 1.083 | 2.250 | 1.500 | 2.750 |
| 275.000 | 250 | 854 | 354 | 1.354 | 458 | 1.625 | 875 | 2.125 |
| 300.000 | - | 333 | - | 833 | - | 1.000 | 250 | 1.500 |
| 325.000 | - | - | - | 313 | - | 375 | - | 875 |
| 350.000 | - | - | - | - | - | - | - | ~~250~~ |
| 375.000 | - | - | - | - | - | - | - | - |

| **Pør** | 1 barn | | 2 børn | | 3 børn | | 4 børn | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Inntøka | Verandi | Nýtt | Verandi | Nýtt | Verandi | Nýtt | Verandi | Nýtt |
| 280.000 | 1.833 | 2.000 | 2.250 | 2.500 | 2.667 | 3.000 | 3.083 | 3.500 |
| 300.000 | 1.500 | 2.000 | 1.833 | 2.500 | 2.167 | 3.000 | 2.583 | 3.500 |
| 325.000 | 1.083 | 1.896 | 1.313 | 2.396 | 1.542 | 2.875 | 1.958 | 3.375 |
| 350.000 | 667 | 1.375 | 792 | 1.875 | 917 | 2.250 | 1.333 | 2.750 |
| 375.000 | 250 | 854 | 271 | 1.354 | 292 | 1.625 | 708 | 2.125 |
| 400.000 | - | 333 | - | 833 | - | 1.000 | - | 1.500 |
| 425.000 | - | - | - | 313 | - | 375 | - | 875 |
| 450.000 | - | - | - | - | - | - | - | ~~250~~ |
| 475.000 | - | - | - | - | - | - | - | - |

Vinaliga

E. Samuelsen

Eyðgunn Samuelsen
landsstýriskvinna